VINNU SÍÐURNAR

Nr. 7 • mikudagur • 12. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Vinnusíður um ráðstevnu



Vinnusíðurnar í komandi viku fara at snúgva seg um olju- og fiskivirnnuráðstevnuna, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum týsdagin 18. januar. Tískil verða tær fluttar frá mikudegnum til týsdagsblaðið ístaðin. Tilfar og lýsingar skulu vera blaðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin. Ætlanin er at gera væl burtur úr ráðstevnuni í vinnusíðunum.

# Nýtt kapittul í oljuleiting byrjar mánadagin

OLJULEITING
*Jan Müller*

Mánadagurin 17. januar kann gerast søguligur dagur í føroyskari vinnusøgu. Tá verða helst loyvini latin oljufeløgunum, sum søktu í 2. útbjóðing á landgrunninum. H etta eru m.a. loyvi, sum liggja tætt upp at tí seinasta stóra oljufundinum við markið, og kann tí sigast, at talan er um eitt nýtt og spennandi kapittul í leitingini eftir olju og gass við Føroyar.

Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini sigur við Sosialin, at tað mesta av arbeiðinum í sambandi við 2. útbjóðing er liðugt. Okkurt smávegis er eftir at fáa uppá pláss, so hann heldur tað er sannlíkt, at loyvini kunnu latast mánadagin komandi. Men tað velds so aftur um, at alt er klárt og liðugt.



*Sigurd í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini sigur, at ætlanin er kunngera leitiloyvini í 2. útbjóðing nú mánadagin.*

Sum skilst hevur gingið væl at viðgera umsóknirnar frá teimum 8 oljufeløgunum. Nú so stórt øki er boðið út kann roknast við, at feløgini hava søkt um nógvar ymsar teigar og tískil kunnu vit rokna við, at feløgini sum heild helst fara at fáa tey øki tey hava biðið um. Hetta vita vit tó ikki við vissu fyrr enn mánadagin.

Tað eru umleið fimm ár síðani, at fyrstu loyvini til leiting eftir olju og gassi vórðu latin oljufeløgum. Tá varð stórt hátíðarhald í Norðurlandahúsinum. Hesaferð verður tað ikki gjørt so nógv burtur úr men Sosialurin skilur, at loyvini fara at verða latin feløgunum við eitt hátíðarhald, sum helst verður seinnapartin mánadagin.

Feløgini, sum hava søkt um leitiloyvi í 2. útbjóðing eru: Statoil, ChevronTexaco, Shell, Dong, OMV, Faroe Petroleum, Atlantic Petroleum og Geysir.

Týsdagin 18. januar verður oljuráðstevna í Norðurlandahúsinum og tá verður 2. útbjóðing ein týðandi partur av skránni.

# Statoil flytur út á Bryggjubakka

OLJUUMHVØRVI
*Jan Müller*



*Nógva leitivirksemið hjá Statoil á landgrunninum setir størri krøv til høli. Nú flytur leitideildin hjá Statoil í gamla smiðjubnygningin úti á Bakka.*

Oljufelagið Statoil, sum er ein av týðandi luttakarunum í oljuleitingini við Føroyar, fer í næstum at flyta inn í høli úti á Bryggjubakka í Vágsbotni. Felagið, sum hevur hildið til í Tórsgøtu, fer ein av komandi døgunum at flyta inn í gamla smiðjubygningin, úti á Bryggjubakka 31, har Fiskasølan hevur hildið til í eina tíð. Sum skilst, so fær oljufelagið munandi betri pláss til sítt virksemi. Statoil er eitt av teimum stóru oljufeløgunum, sum er mest virkið í leiting á landgrunninum. Roknast kann við, at tað eisini verður tað oljufelagið, ið fær tillutað flest loyvi í 2. útbjóðingarumfarinum, sum eftir øllum at døma verður kunngjørt komandi mánadag.

Nú flutt verður inn á Bryggjubakka kann sigast, at økið er vorðið oljuumhvørvi burturav. Frammanundan húsast í grannalagnum bæði italska oljufelagið AGIP og tað føroyska Føroya Kolvetni . Í síni tíð vórðu eisini oljufeløgini Texaco og Saga partur av umhvørvinu m í Vágsbotni. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa nakra viðmerking frá Statoil til ætlanina at flyta.